Nakrar halda seg langt vekk frá djúpasta hylinum, men tær, sum fara í tann hylin, leypa av vippunum og kava sum einki

Mynd: Jens Kristian Vang

Framhald av forsíðuni

høvdu morgunfrúurnar, og tað var eitt vakurt blómutyssi, sigur ein í svartari baðihettu og flennir.

Tær greiða frá, at tær hava altið gjørt nógv burturúr. Tá gamli svimjihylurin lat aftur, klæddu tær seg út og dansaðu í hylinum, og hetta gjørdu tær eisini meira enn ta einu ferðina. -

- Vit svimja í ein tíma, men tá tað villa lagið er á okkum, so er tað altið meira. Aftaná fara vit til kaffi og prát í kaffistovuni. Tá gamli svimjihylurin var, ferðaðust morgunfrúurnar runt Føroyar at svimja um veturin, tí tá lat svimjihylurin í Havn aftur. Einaferð um árið er útferð á skránni, og annars koma tær saman, tá onkur hevur føðingardag og líknandi. - Vit vóru einaferð í Klaksvík og spurdu eftir morgunfrúum har, men tey høvdu ongar. Tey søgdu, at tey skuldu fara at fáa sær, men eg veit ikki, hvat tað verður til, sigur tann eina.

Tær flestu morgunfrúurnar eru í 70´unum. Tær høvdu ynskt, at fleiri yngri komu við, so at siðurin ikki dettur niðurfyri. -

- Hetta er so hugnaligt. Ein vanligan dag eru vit millum 10 og 15, og tá vit møtast, so verða vit altið so glaðar, siga tær.

Men tær hava als ikki tíð at tosa. Tær vilja heldur sleppa at svimja. Og vippurnar eru ongin trupulleiki. Fimm-metur vippan er eitt spæl. Tær kava niður í hylin, sum hava tær ikki gjørt annað síðani tær vórðu føddar. Stuttligt er tað hóast alt. Hesar kvinnurnar, sum eru bæði dupult og tríggjar ferðir, ja, kanska enntá fýra ferðir so gamlar sum tey ungu, sum svimja henda morgunin, kava niður í hylin sum onki. Men ein unglingi, sum kemur upp á fimm-metur vippuna er noyddur at taka trappurnar niður aftur, tí hann torir ikki.

Regnið oysir framvegis niður, men tað leggja morgunfrúurnar onki í. Tær vilja bara stuttleika sær.

EG MEINI TAÐ

Er løgmaður Ný Sælendari?

Niels Uni Dam skrivar:

Eg havi júst verið í Ný Sælandi, deiligur túrur, har er summar í løtuni, so sólin skein fyri tað mesta. Ótrúliga vøkur náttúra, eitt veruliga bergtakandi land. Meðan eg var har, vóru tað serliga tvær hendingar sum fingu nógv pláss í fjølmiðlunum. Fyrsta hendingin var eitt ódnarveður, sum sundursmildraði eina av teimum minnu oyggjunum. Hetta var eitt ræðuligt ódnarveður og øll húsini á oynni fórust.

Næsta hendingin var, tá ein grind gjørdi landgongd á einari av hinum oyggjunum. Hetta var ein grind á 80 hvalir, ein fittur døgurðabiti til Ný Sælendarar hugsaðu vit. Men nei, ístaðin fyri at drepa hesar stakkals hvalir, sum gjørdu landgongd, so fóru Ný Sælendarar mannsterkir frá húsum, at bjarga hesum neyðars hvalum.

Hetta varð kallað ein stór náttúruvanlukka. Í samfullar 24 tímar royndu menn og konur at skumpa hesar hvalir út aftur á sjógv. Onnur stoyttu sjógv á svørtu kropparnar, soleiðis at teir ikki skuldu torna og doyggja, alt meðan hvalirnir spakuliga stoktust livandi í heitu sólini. Tá teir 24 tímarnir vóru farnir, vóru 15 hvalir slopnir aftur á sjógv, og tann seinasti av hinum 65 hvalunum var deyður.

Bjargingarfólkið var ólukkuligt, tíðindamaðurin var ólukkuligur, og býráðið í oynni var ólukkuligt. Ja, býráðið var so ólukkuligt, at strondin var gjørd til friðhalgað land. Eingin hevði loyvi at fara oman á hetta heilaga sorgarstað, áðrenn líkini av hesum hábærsligu sjóverum vóru burtur. Tá eg fór úr Ný Sælandi var enn ikki avgjørt, um hvalirnir skuldu sleppa at liggja á strondini, til náttúran tók teir burtur, ella um kommunan skuldi taka teir burtur.

Meðan hetta mál fylti ný sælendsku fjølmiðlarnar, fylti málið um Jørgen Niclassen føroysku miðlarnar, og eg kann ikki heilt halda mær aftur frá at draga paralellir. Eg skal ikki fara og leggja meg út í, um Jørgen er ein banditt ella ikki, ella um hvussu væl hansara leiklutur í hesum máli luktar, men tá frágreiðingin ikki heilt klárt fríkendi Jørgen, var tað heilt týðuligt, at Jørgen hevði gjørt landgongd. Sum politiska støðan er í dag var lættasta og besta loysnin at skera Jørgen á háls beinanvegin. Fólkaflokkurin kundi hervið fingið grind til døgurða (eitt sindur av trúvirði).

Men okkara fitti løgmaður helt, at synd var í hesum neyðars hvali, og eins og ein ný sælendari royndi hann at skumpa Jørgen út aftur, meðan restin av fólkaflokkinum oysti vatn á Jørgen. Men úrslitið var tað sama sum í Ný Sælandi. Hvalurin var gjøgnumstoktur livandi í sólini. Jú gamaní, Jørgen hevur vunnið nógva samkenslu millum fólk, men mundi sviðin ikki vera øðiligur í tingsalinum. Eg ivist í um tað veruliga var vert sviðan.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

Í nátt meg droymdi løgnan dreym

– Nú er dreymurin hjá býráðnum gingin út. Norrøna liggur so prúð og stór á Glade Hjørn! Er hetta ikki stórt? hugleiðir Ása undir Kletti

HUGLEIÐINGAR
Ása undir Kletti
auk@post.olivant.fo

Rópini gerast harðari og harðari. Tað rungar millum húsini. Eg hoyri ikki hvat eg sjálv hugsi, tí gangurin er so øgiligur. Alt er á gosi — handlarnir, sum ikki eru fluttir ella ekspropieraðir, tí teir ikki vildu flyta við góðum, eru afturlatnir henda merkisdag. Fólk tysja út á gøturnar. Merkini veittra frá fleiri bygningum, serliga teimum hjá Tórshavnar Kommunu. Teir hava eisini spesielt nógv at feira. Nú er dreymurin hjá býráðnum gingin út. Norrøna liggur so prúð og stór á Glade Hjørn! Er hetta ikki stórt?

Fútastova, Café Natúr og Hotel Djurhuus eru ikki longur. Hvat skuldu vit eisini hava tey til? Tey vóru bara til fortreð - ein fløskuhálsur. Einki pláss var, hvørki so ella so. Nei. Nei. Burtur við teimum. Tey vóru heldur ikki serliga pen ella prýðilig. Tey vóru eisini tey einastu, sum veruliga forðaðu fyri nýggja rakstrarrópinum/verkætlanini hjá Tórshavnar Býráð: "Norrøna í miðbýin, Norrøna í miðbýin." Ja. Og so sjálvandi Tinganes, men tað var so skjótt at spreingja í luftina og gekk so væl í hond at javna við jørðina, at tað bert var ein pinkalítil lýsing í "teimum gulu" ein leygardag, sum kunnaði um hendingina.

Onkur hevur onkuntíð hildið, at tað hevði verið hugfarsligt at tikið oman av Havnará og latið hana uppaftur og eisini lagt eitt fýramannafar í hana júst sum í gomlum døgum, men hví í allari víðu verð skuldu vit tað? Og so var hetta "prosjektið" alt ov roksut og "nostalgiskt."

Nú er skrædlað omanav so lættliga, sum var tað ein sardindós, teir lótu upp, og so heilt niðan til Sparikassan. Á ja. Tað gloymdi eg at nevna. Hann er eisini burturfluttur. Harragud, hann var frá 1832. Koyr alt hatta gamla skramblið burtur. 171 ára gamalt grót. Hvat skal tað til?

Ebenezer er nú í "Meksiko" og Handilskjarnin í "Kina." Her er einki óført. Latið upp fyri nýggju føgru verðini.

Konditturíið, harafturímóti, var longu friðað í klassa A, tí tað er jú staðið, har býráðið tekur sínar ordiliga stóru avgerðir, hevur onkur lýttað mær í oyrað.

Og so er tað Tinganes, hetta vælsignaða stað. Var tað ikki eisini bara til fortreð? Og Reynið sjálvt? Gamlar kroysur, sum næstan eru so tættar, at teir stuðla sær upp at hvørji aðrari fyri ikki at detta. Næstan einki betong ella asfalt, og slettis einki pláss til bilar. Óruddiligt og ótespiligt. Og hvør hevur brúk fyri at minnast tað gamla ella ganga og spáka sær út á Reyn? Nei. Hetta er einki at varðveita, fjálga um og røkja.

Tað er burtur — sprongt burtur við høvdi og gørnum. Sjó- og Vektabúðin, Stokkastovan, Klettaskot, undir Kletti!, Kristnastova, Nýggjastova, Baianstova, Gongin, og sum nevnt, Fútastova, Knútsstova, Vertshúsið - alt er horvið. Her er sum hjá H.C. Andersen: "Alles ist væk, væk, væk." Havi hug at lippa.

Og løgmaður. Ja, hann mundi eisini farið í luftina, men tað var av heilt øðrum orsøkum. Portugálið er heldur ikki til longur. So gloyma vit eisini lættari ótespiligu Gablatíðina. Ud af øje, ud af sind, ha?

Men afturfyri alt sum farið er, kunnu tey, ið ferðast við nýggju Norrønu, bert rætta hondina yvirum til Føroya Banka og veksla sær pening. Føroya Banki hevur nú eina spesiella avgreiðslu á fjórðu hædd. SMS hevur drive-in og Føroya Banki hevur sail-in. Hugsið tykkum. Standa á dekkinum og rætta hondina út! Fantastiskt, ha? Onkur nevndi, at tað hevði verið skilagott, at Norrøna sigldi á Kollafjørð, men hví tað, tá hon kann liggja og duffa so hugfarslig á Glade Hjørn?

Eri vavd inn í dýnuna, sum ein onnur klutrimamma, so eg næstan ikki sleppi burturúr henni aftur. Sveittin lekur av mær — eg berjist sum úlvur á skóg. So rakni eg við. Tað var bert ein marrudreymur. HETTA VAR BERT EIN MARRUDREYMUR.. — I have a dream.....